# Kunngerð

Vísandi til samtykt bygdaráðsins tann 26. juni 2006 fer

**vegleiðandi fólkaatkvøða fram ley–gardagin tann 9. september 2006.**

Fólkaatkvøðan fer fram í skúlahøllini í 1974 skúlanum

**frá kl. 10.00 til kl. 20.00**

ella so leingi veljarar møta uttan steðg, og verður tá fólkaatkvøðan lýst liðug.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini í hendi innan valið byrjar kl. 10.00 tann 9. september 2006.

**Heimaval:**
Veljarar, sum vegna sjúku ella vantandi førleika, ikki kunnu møta við valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri fólkaatkvøðuna við at boða kommunuskrivstovuni frá – helst innan kl. 15.00 hósdagin 7. september 2006 á tlf. 441.012.

**Valkort:**
Valkort verða send út við postinum. Um persónur, sum heldur seg hava valrætt í kommununi ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Mint verður á, at tygum eiga at hava valkortið við á val.

Gøtu tann 24. juli 2006

**GØTU KOMMUNA**

Páll Isholm
borgarstjóri

Gøtu Kommuna

# Kunngerð

Vísandi til bygdarráðssamtykt 26. juni 2006 fer

**vegleiðandi fólkaatkvøða fram leygardagin tann 9. september 2006.**

Fólkaatkvøðan fer fram á kommunuskrivstovuni

kl. 10.00 – kl. 20.00

ella so leingi veljarar møta uttan steðg, og verður tá fólkaatkvøðan lýst liðug.

**Brævatkvøður:**
Veljarar, ið verða burturstaddir valdagin ella á annan hátt lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu í seinasta lagi dagin fyri valið greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini í hendi innan valið byrjar kl. 10.00 tann 9. september 2006.

**Heimaval:**
Veljarar, sum vegna sjúku ella vantandi førleika, ikki kunnu møta við valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi dagin fyri fólkaatkvøðuna við at boða kommunuskrivstovuni frá – helst innan kl. 15.00 hósdagin 7. september 2006 á tlf. 443 006.

**Valkort:**
Valkort verða send út við postinum. Um persónur, sum heldur seg hava valrætt í kommununi ikki fær valkort sendandi, verður viðkomandi biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna.

Mint verður á, at tygum eiga at hava valkortið við á val.

Leirvík, tann 24. juli 2006

**LEIRVÍKAR BYGDARRÁÐ**

Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri

**Leirvíkar Kommuna**
**Postboks 42**
**520 Leirvík**

**VINNUMÁLARÁÐIÐ**

## Vinnumálaráðið søkir eftir løgfrøðingi til avloysarastarv

Fyri løgfrøðing í farloyvi søkir Vinnumálaráðið eftir løgfrøðingi. Talan er um eitt fulltíðar barsilsavloysarastarv frá 18. september 2006 og 6 mánaðir fram við møguleika fyri leingjan.

**Arbeiðið**
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru:

- At veita landsstýrismanninum og stjóranum løgfrøðiliga ráðgeving
- At gera uppskot til lógir og kunngerðir
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava løgfrøðiligt embætisprógv (cand.jur.). Umsøkjarar, ið hava staðið bachelor útbúgving í løgfrøði, eru eisini vælkomnir at søkja.

Umsøkjarar skulu duga føroyskt og enskt væl, umframt at umsøkjarar skulu hava kunnleika til EDV.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir Vinnumálaráðnum, umframt onnur stjórnarráð.

Umsókn, saman við prógvum, CV, viðmælum o.ø., skal verða send til

**Vinnumálaráðið**
**Postsmoga 377**
**110 Tórshavn**

Freistin at søkja er ***mánadagin 14. august 2006.***

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Arna Poulsen, stjóra, tlf. 356070.

# Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan afturlatin frá 31. juli - 11. august

Boð kunnu sendast í telduposti til
**liv@liv.fo**
ella ringja á telefon 589999

Opið er aftur sum vanligt mánadagin 14. august.

LÍV Føroya Lívstrygging

## Hús til sølu í Klaksvík

Hús á Stoksoyravegi 37 í Klaksvík til sølu.
Húsinini standa frítt við góðum útsýni.
Talan er um hús í tveimum innrættaðum hæddum, íalt 105 kvadratmetur, umframt lítil kjallari við fýrrúmi.
Á stykkinum er úthús við vaskirúmi og hjalli omaná, sum eru 15 kvadratmetur hvør.
Grundøkið er íalt 651 kvadratmetur.
Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.

***Tlf. 27 72 24 til og við 27. juli.***
***Tlf. 0045 23 25 49 16 frá 31. juli.***

FØROYA LÆRARASKÚLI

# Starv

Fyri skúlaárið 2006/2007 er eitt ársvikariat leyst at søkja í sálarfrøði og uppgávum, sum eru knýttar afturat sjálvari frálæruni.
Harafturat verður søkt eftir tímalærara í føroyskum at lesa íalt 150 tímar í námsfrøðisútbúgvingini.
Setanir verða sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir skulu sendast til:

**Føroya Læraraskúla**
att. Jóannes Hansen, rektari
Postsmoga 348
FO-110 Tórshavn
í seinasta lagi 7. august